LANDSROYND 6. FLOKKUR
MAI 2009
Føroyskt, lesa og skilja tekst

# FØROYSKT

**45 minuttir**



Mynd úr www.skulin.fo

| Navn: | Flokkur: |
| --- | --- |
| Skúli: | Lærari: |

Svarini verða skrivað á uppgávuarkið. Byrjað verður við fyrstu uppgávu á síðu 2, og síðani verða uppgávurnar loystar í teirri raðfylgju, tær koma. Tú kanst skriva við blýanti.

## Til næmingin

## Les søgurnar og svara spurningunum

Hanus er 12 ára gamal og gongur í 6. flokki í Tórsvík. Tórsvík er ein lítil bygd í Føroyum, og í skúlanum í Tórsvík eru bara 40 næmingar. Í 6. flokki eru 10 næmingar, og tað er størsti árgangur í skúlanum. Í 7. flokki ganga bara 4 næmingar, so hesir báðir flokkarnir eru lagdir saman. Hanusi dámar væl, at flokkarnir eru saman, tí besti vinmaður hansara, Kári, gongur í 7. flokki, og honum dámar eisini so stak væl Biritu, sum eisini gongur í 7. flokki.
Hanus er einabarn. Tað er hann eitt sindur keddur um, tí mamma og pápi hansara arbeiða bæði í høvuðsstaðnum og eru tí ofta sein við hús. Hann er ofta einsamallur inni aftan á skúlatíð. Hann er eitt sindur øvundsjúkur inn á Kára, sum eigur eina eldri systur og fýra yngri beiggjar. Mamma Kára er heimagangandi, og pápin er bátasmiður og arbeiðir í kjallaranum, so har er altíð onkur inni. Hanusi dámar væl at fara til Kára, tí har er altíð lív í, men Kári heldur, at Hanus er tann hepnari av teimum báðum, tí at hann altíð kann gera tað, ið hann hevur hug til, uttan at foreldur ella systkin blanda seg.

## Set x við rætta svarið!

Hvussu gamal er Hanus?

10 ár __________

11 ár __________

12 ár __________

Í hvørjum flokki gongur Hanus?

7. flokki __________

5. flokki __________

6. flokki __________

Í hvørjum flokki ganga Birita og Kári?

6. flokki __________

7. flokki __________

5. flokki __________

Hvar búgva børnini?

Í Tórsvík __________

Í Hósvík __________

Í Hvalvík __________

| | | | |
|---|---|---|---|
| Hvussu nógv børn eru í samanlagda flokkinum? | | Hvussu nógv systkin eigur Hanus? | |
| 10 børn | ________ | tvey | ________ |
| 13 børn | ________ | eingi | ________ |
| 14 børn | ________ | trý | ________ |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Hvussu nógv systkin eigur Kári? | | Hvar er Kári í systkinaflokkinum? | |
| trý | ________ | elstur | ________ |
| fýra | ________ | yngstur | ________ |
| fimm | ________ | næstelstur | ________ |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Foreldrini hjá Hanusi arbeiða í: | | Pápi Kára arbeiðir í: | |
| Klaksvík | ________ | Klaksvík | ________ |
| Tórsvík | ________ | Tórsvík | ________ |
| Tórshavn | ________ | Tórshavn | ________ |

Hanus stúrir eitt sindur fyri næsta skúlaári, tí tá flyta bæði Kári og Birita í annan skúla at ganga. Eingin framhaldsdeild er í Tórsvík, so næmingarnir fara í framhaldsdeild í grannabygdini, sum er ein stór bygd við nýggjum skúla. Systir Kára, Annika, gongur í 10. flokki, og henni dámar sera væl skúlan. Tað einasta, sum hon heldur vera keðiligt, er ferðingin, serliga tí hon skal so tíðliga upp. Hon fer við bussinum hvønn morgun kl. 7.15 og plagar at vera við hús aftur kl. 15.45.
Kári gleðir seg, til hann skal í framhaldsdeild, men Birita hevði heldur viljað, at framhaldsdeild var í Tórsvík. Hon er eitt sindur smæðin og dámar best at vera ímillum fólk, ið hon kennir væl. Birita er yngst av trimum systrum. Hinar báðar systrarnar eru nógv eldri enn Birita og búgva ikki longur heima. Eldra systirin býr í London, har

hon lesur okkurt innan tónleik, meðan hin systirin er gift og eigur tveir synir, sum eru trý og eitt ára gamlir. Hon, maðurin og dreingirnir hava fyri kortum keypt eini raðhús í Havn, og Birita plagar onkuntíð at fara til Havnar at vitja tey. Onkuntíð er hon barnagenta hjá dreingjunum, tí bæði systirin og maður hennara syngja við einum kóri, og tí mugu tey út samstundis. Biritu dámar væl at ansa dreingjunum, men hon biður ofta Hanus og Kára koma við sær, tí henni dámar ikki so væl at vera einsamøll saman við teimum smáu um kvøldið.

## Set x við rætta svarið

| Hvussu leingi er Annika heimanífrá, tá hon er í skúla? | | Hvussu nógv ár er Annika eldri enn Kári? | |
|---|---|---|---|
| 8 tímar | ________ | 1 ár | ________ |
| 8 og ein hálvan tíma | ________ | 8 ár | ________ |
| 9 og ein hálvan tíma | ________ | 3 ár | ________ |

| Hvussu nógv systkin eigur Birita? | | Hvar býr eldra systir Biritu? | |
|---|---|---|---|
| 3 systkin | ________ | Í Noregi | ________ |
| 2 systkin | ________ | Í Onglandi | ________ |
| 1 systkin | ________ | Í Íslandi | ________ |

| Hvussu er Birita skyld við smáu dreingirnar? | | Hvørjum hava báðar systrar Biritu áhuga fyri? | |
|---|---|---|---|
| fastir/pápasystir | ________ | tónleiki | ________ |
| mostir/mammusystir | ________ | ítrótti | ________ |
| systir | ________ | dansi | ________ |

Hanus og Kári spæla báðir hondbólt við Kyndli. Einki hondbóltsfelag er í Tórsvík, so teir báðir mugu fara aðrastaðni, um teir skulu spæla hondbólt. Teir hava valt at spæla við Kyndli, tí systkinabarn Kára, sum býr í Havn, spælir við Kyndli, og busssambandið til Havnar er gott. Hanus og Kári hava ikki spælt við sama liði hetta kappingarárið, men næsta vetur skulu báðir spæla við dreingjum 14 ár. Tað eru nú tveir mánaðir, síðani hondbóltskappingin endaði, men Hanus minnist enn seinasta dyst ímóti Neistanum, sum gjørdist rættiliga spennandi. Neistin var frammanfyri allan dystin, men í seinasta sekundi fekk Kyndil brotskast. Hanus var settur at taka brotskastið. Hann minnist enn, hvussu torført tað var at skula taka avgerandi brotskastið, og nógv stóð á honum. Tíbetur eydnaðist tað honum at fáa bóltin í málið, og dysturin endaði við javnleiki.
Aftan á dystin fór liðið í bovlinghøllina at bovla og fáa sær ein bita. Tað var ein hugnaligur dagur. Allir dreingirnir tosaðu um kappingarárið, sum var at enda komið. Teir vóru nøgdir, hóast teir ikki gjørdust nummar 1, tí teir høvdu spælt nógvar góðar dystir.
Aftan á kappingina stóð støðan hjá øllum liðunum í hondbóltskappingini í bløðunum. Hanus klipti talvurnar yvir dreingir 12 ár og dreingir 14 ár út og goymdi tær í skuffuni. Av og á tekur hann talvurnar fram og hyggur eftir endaliga úrslitinum.

**Støðan hjá 4 teimum fremstu liðunum í báðum aldursbólkunum var henda:**

**Dreingir 12 ár:**

| | dystir | vunnir | taptir | javnir | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| VÍF | 14 | 10 | 2 | 2 | + 35 | 22 |
| Kyndil | 14 | 9 | 3 | 2 | + 25 | 20 |
| Neistin | 14 | 8 | 3 | 3 | + 15 | 19 |
| StÍF | 14 | 8 | 5 | 0 | + 20 | 16 |

**Dreingir 14 ár:**

| | dystir | vunnir | taptir | javnir | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| H71 | 12 | 12 | 0 | 0 | + 50 | 24 |
| KÍF | 12 | 9 | 2 | 1 | + 25 | 19 |
| VB | 12 | 8 | 4 | 0 | + 27 | 16 |
| Tjaldur | 12 | 7 | 3 | 2 | + 12 | 16 |

## Set x við rætta svarið

| Hvat nummar gjørdist Kyndil í kappingini hjá dreingjum 12 ár? | | Hvør vann kappingina hjá dreingjum 14 ár? | |
|---|---|---|---|
| nr 4 | ___________ | Tjaldur | __________ |
| nr 2 | ___________ | H71 | __________ |
| nr 3 | ___________ | KÍF | __________ |

| Hvat lið spældi flestar javnleikir hjá dreingjum 12 ár? | | Hvussu nógvar dystir vunnu dreingir 14 ár hjá Tjaldri? | |
|---|---|---|---|
| StÍF | ___________ | 10 | ___________ |
| Kyndil | ___________ | 9 | ___________ |
| Neistin | ___________ | 7 | ___________ |

| Hvussu nógv stig var VÍF framman fyri Kyndil hjá dreingjum 12 ár? | | Hvussu nógvar dystir taptu dreingir 12 ár hjá Kyndli? | |
|---|---|---|---|
| 3 stig | ___________ | ein | ___________ |
| 2 stig | ___________ | tveir | ___________ |
| 1 stig | ___________ | tríggjar | ___________ |

| Hvussu nógv betri málmun hevði VB enn Tjaldur hjá dreingjum 14 ár? | | Hvussu nógv verri málmun hevði Kyndil enn VÍF hjá dreingjum 12 ár? | |
|---|---|---|---|
| 12 mál | ___________ | 10 mál | __________ |
| 13 mál | ___________ | 11 mál | __________ |
| 15 mál | ___________ | 12 mál | __________ |

6. og 7. flokkur í Tórsvík skulu hava evnisarbeiði um fuglar í eina viku. Hanus gleðir seg, tí hann hevur altíð havt sera stóran áhuga fyri fuglum. Um várið og um summarið er hann ofta í haganum og hyggur eftir fuglum. Hann hevur altíð kikara við, tí so fær hann betur fylgt við fuglalívinum í haganum.

Í fjør hevði flokkurin hjá Hanusi vitjan av einum donskum skúlaflokki. Báðir flokkarnir høvdu ferðast saman kring oyggjarnar. M.a høvdu tey verið undir Vestmannabjørgunum. Tað var ein ógloymandi túrur, og bæði føroysku og donsku børnini høvdu fingið nógv burturúr. Hanus plagar at kjatta við eina av donsku gentunum, Lenu, og hon hevur ofta sagt, at túrurin undir bjørgunum var hin besti á ferðini.

Hanus, Kári og Birita skulu arbeiða saman í evnisvikuni, og tey hava longu gjørt nógv burturúr.

Tey hava øll lisið eina rúgvu um fuglar, funnið myndir av fuglum á alnetinum og lurtað eftir fuglaljóðum á bandi.

Tey ætla sær at gera eina framsýning av ymiskum fuglum og skriva tekst til.

## Set x við rætta svarið

| 6. og 7. flokkur skulu arbeiða við evninum: | | Hanus, Kári og Birita hava | |
|---|---|---|---|
| fiskar | ________ | skrivað nógv | _________ |
| súgdjór | ________ | lisið nógv | _________ |
| fuglar | ________ | teknað nógv | _________ |

| Í fjør hevði 6. flokkur vitjan av einum flokki úr: | | Hanus plagar at kjatta við: | |
|---|---|---|---|
| Danmark | _________ | Lisu | _________ |
| Noregi | _________ | Karinu | _________ |
| Íslandi | _________ | Lenu | _________ |

Í gjár las Hanus hetta í eini fuglabók:

Um summarið sæst nógvur fuglur í bø og haga. Um veturin fer nógvur fuglur burtur í onnur, heitari lond. Tó eru nøkur fuglasløg í Føroyum alt árið, t.d. kráka, ravnur og bládúgva. Hesir fuglar hava vant seg við livikorini í Føroyum og flyta ikki burtur um veturin.
Fuglur hevur fjaðrar. Fjaðrarnar eru lættar og viga næstan einki, tí nógvur fuglur má flúgva langa leið. Fjaðrar og dún verja kroppin og halda hann heitan. Tá ið fuglur svimur, sleppur sjógvur ikki inn ímillum fjaðrarnar. Fuglur brúkar nógva tíð at píska fjaðrarnar, og oman fyri velið er ein fitikertil. Hann smyr fjaðrarnar við fiti úr kertlinum.
Fuglur hevur ikki tenn, men nógvir hava sterkt nev. Nevið á fugli sær ymiskt út alt eftir, hvat hann etur. Spógvi hevur t.d. langt, spískt, bogið nev, sum ger tað møguligt hjá honum at leita eftir møðkum.
Flestu fuglar hoyra og síggja væl, men hava ikki gott tev.
Velið gevur javnvág, og fuglurin kann stýra við tí, tá hann flýgur.
Fuglur verður bólkaður eftir útsjónd, og hvar hann heldur til, t.d. vaðfuglur, heiðafuglur og sjófuglur.
Um veturin er vanligt at síggja smáfugl húsanna millum. Talan kann vera um stara, kvørkveggju og spurv, men tað er eisini vanligt at síggja størri fugl, t.d. kráku og dúgvu. Um veturin hevur fuglurin ilt við at finna sær føði og kemur tí nærri húsunum.
Fara vit ein túr í bøin ella hagan, so sæst eisini nógvur fuglur, t.d. tjaldur, spógvi, mýrisnípa og lógv. Hesir fuglar eru flytifuglar. Teir flyta í onnur lond um heystið og koma aftur um várið.

**Tjaldrið** 

Tjaldrið kemur til Føroya á grækarismessu, 12. mars, og fer úr Føroyum tíðliga um heystið. Summi fara longu fyrst í september. Tey fara til Írlands, Skotlands og Onglands.
Tá ið tjøldrini koma til Føroya, síggjast tey ofta í fjøruni, har tey leita sær eftir møðkum, flogkyktum og ormverum í taranum.
Um summarmála fara tjøldrini at reiðrast. Bøgan og steggin leita eftir staði til reiður, men oftast er tað steggin, ið ger kullur í jørðina. Bøgan velur sær eina kullu til reiður. Á botninum í reiðrinum liggja smásteinar og uttan um reiðrið smásteinar og kanska skeljar. Eggini og reiðrið fella væl saman við lendinum.
Bøgan verpur vanliga trý egg, onkuntíð fýra. Tjaldur sigst hava fult reiður á gomlu krossmessu, 15. mai. Bøgan og steggin skiftast at bøla, men bøgan liggur mest á. Steggin situr stutt frá reiðrinum og ansar eftir.
Tá ið 3 – 4 vikur eru farnar, koma ungarnir út. Bøgan og steggin føða ungarnar í tríggjar vikur, men so skulu teir vera sjálvbjargnir.

**Spógvin** 

Spógvin er ein tann vanligasti búfuglurin í haganum. Spógvi er flytifuglur og sæst í haganum frá apríl-mai mánaði.
Spógvi hevur eyðkent nev, langt, spískt og bogið, og beinini eru long og blágrá.

Spógvi eigur nærhendis mýrilendi. Hann ger sær reiður í svørðin og klæðir tað við mosa og deyðagrasi. Bøgan verpur vanliga fýra egg seint í mai. Spógvin dugir væl at leggja eggini. Fyrst verpur hann trý egg, sum hann leggur saman við spíska endanum móti hvørjum øðrum. Síðan verpur hann fjórða eggið, sum hann leggur omaná.
Bøga og steggi skiftast at bøla. Tá ið ungarnir koma út, eru teir bleikgulir og hava myrkamorreyðar prikkar og ein avlangan, svartan ring um høvdið. Foreldrini taka sær av ungunum í um leið ein mánað. Tá eru teir sjálvbjargnir.
Teir gomlu spógvarnir rýma í august. Ungarnir fara eitt sindur seinni. Spógvin flytur til Vesturafrika um veturin.

**Krákan** 

Kráka er støðufuglur og er í Føroyum alt árið. Hon sæst ofta á bønum, har hon leitar eftir ormum og sniglum. Hon ger seg inn á aðrar fuglar, tó ikki smáfuglar, tí at teir eiga í trongari holu.
Kráka heldur seg í flokkum, og krákur semjast væl sínámillum. Hon er klókur og varin fuglur.
Kráka leitar eftir føði allastaðni. Onkuntíð etur hon deyð dýr, t.d. deyðseyð, ræstan ella feskan fisk og ymiskt rusk. Aðrar tíðir etur hon maðkar, ormar og flogkykt. Kráka rænir eisini bæði egg og ungar úr reiðrum. Krákur taka seg eisini saman tvær og tvær. Tá kunnu tær finna uppá at taka haruungar. Onnur lokkar haruna út, meðan hin tekur ungarnar. Fleiri krákur saman kunnu eisini leggjast á vaksna haru, og tær taka eisini rottur og mýs. Krákur eru eisini í fjøruni, har tær taka skeljadýr. Fáa tær ikki hol á skeljarnar, flúgva tær upp í loft og sleppa skeljunum, so tær brotna.
Í februar-mars mánað taka krákurnar seg saman í pør og fara at leita eftir staði at reiðrast í. Kráka eigur í gjáum og homrum. Seinast í apríl er reiðrið liðugt. Tað er gjørt úr lyngi og grøsum og klætt við ull innan.
Eftir krossmessu verpur bøgan 5-6 grøn egg. Bøgan bølir einsamøll í 14 dagar. Foreldrini føða ungarnar, sum mugu vera í reiðrinum í 4-5 vikur, tí teir eru bæði naknir og blindir.
Um heystið og veturin taka krákurnar seg saman í flokk.

**Ternan** 

Terna eigur helst nær sjógvi ella vøtnum, tó finnast ternureiður líka frá strondini og upp í fjøllini út móti sjónum. Ternur eiga so tætt, at vit mugu ansa okkum ikki at stíga í reiðrini.
Ternan er flytifuglur og kemur til Føroya um hálvan mai.
Seinast í mai og fyrst í juni verpur hon tvey egg, viðhvørt trý. Klekingartíðin er knappliga tríggjar vikur. Ternupisurnar eru ringar at síggja, tí tær falla væl saman við lendinum. Ternupisa er viðbrekin og tolir ikki regn og kulda. Regnsummur í Føroyum týna ofta nógvar ternupisur.
Um miðjan juli eru flestu ternur rýmdar frá reiðrinum. Pisurnar fara við foreldrunum út á sjógvin at leita eftir føði. Tá ið pisan er 40 dagar gomul, klárar hon at føða seg sjálv.
Seinast í september rýmir ternan úr Føroyum til Suðurpólin. Eingin fuglur hjá okkum flýgur so langt sum ternan.

## Set x við rætta svarið

Hvør av hesum fuglum verpur seinast?

tjaldur __________

terna _________

kráka ___________

Hvør av hesum fuglum kemur seinast til Føroya?

spógvi __________

tjaldur __________

terna __________

Hvør av hesum fuglum er flytifuglur?

kráka _____________

ravnur _____________

spógvi _____________

Hvør av hesum fuglum er støðufuglur?

tjaldur ___________

bládúgva ___________

terna ___________

Hvør av hesum fuglum verpur flest egg?

terna ___________

tjaldur ___________

kráka ___________

Nær kemur tjaldrið til Føroya?

á krossmessu ___________

á grækarismessu __________

á kyndilsmessu __________

## Set S (satt) ella Ó (ósatt) á regluna

Fuglur hevur fjaðrar ________

Fuglur hevur tenn ________

Fuglur hoyrir væl ________

Fuglur sær illa ________

Fuglur hevur gott tev ________

Tjaldrið er støðufuglur í Føroyum ________

Spógvin er vanligasti búfuglur í haganum ________

Spógvin hevur langt, spískt og bogið nev ________

Spógvin flytur til Skotlands um veturin ________

Krákan er flytifuglur í Føroyum ________

Krákan eigur í gjáum og homrum ________

Ternan kemur til Føroya um hálvan mai ________

Seinast í mai og fyrst í juni verpur ternan 5 egg ________

Ternupisur tola illa regn og kulda ________

Ternan flytur til Suðurpólin um veturin ________

Tjaldrið flytur til Vesturafrika um veturin ________